# Gera film um Sofus Olsen

**Upptøkurnar til film um lívið hjá manninum, ið lesararnir hjá Sosialinum valdu til ársins mann í 2005, eru komnar undir land, og í næstum verður farið undir at klippa saman film, ið skal vísast á Listasavninum á Sandi**

MENTAN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Bjarheðin í Hoyvík filmaði m.a. Sofus inni í Listasavninum á Sandi*

*Mynd: Niels Uni Dam*

Hósdagin vóru Sofus Olsen og myndamaðurin Bjarnheðin í Hoyvík á Sandi og gjørdu síðstu upptøkurnar til film, ið nú verður gjørdur um lívið hjá sandinginum, sum í fjør lat Listasavnið á Sandi byggja.

Tað er vinkonan hjá Sofus og nevndarlimurin í Listasavninum á Sandi, Karin Kjølbro, ið hevur tikið stig til at gera filmin. Hon hevur somuleiðis fingið í lag fíggingina av filminum.

Tað er Bjarnheðin í Hoyvík, ið hevur tikið sær av upptøkunum.

Ætlanin er sambært Karin Kjølbro, at filmurin, tá hann er liðugur, verður vístur á Listasavninum á Sandi. Tey, ið vitja savnið, kunnu soleiðis uppliva listina á savninum í teimum karmum, hon hevði heima hjá Sofusi. Eisini kunnu tey hoyra um merkisverda lívið, hjá Sofusi. Í røðu hon helt, tá Listasavnið á Sandi lat upp, segði Karin:

- Vit sum kenna Sofus Olsen vita, at hann dugir sera væl at siga frá og hevur humor. Tí hava vit borið so í bandi, at tað verður gjørdur sjónvarpsfilmur til Listasavnið á Sandi, har vit kunnu síggja alla listina, sum hon hekk í heiminum hjá honum og Gunnhild á Tinghúsvegnum. Eisini fer Sofus at siga frá um lív sítt og um listina. Tey, ið vitja listasavnið á Sandi kunnu so fáa hesa uppliving framíhjá.

Sofus Olsen hevur livað eitt sera hendingaríkt lív, sum sluppfiskimaður, sum mótstøðumaðurin í Keypmannahavan undir krígnum, sum reiðari við góðum úrslitum í ein mansaldur, í álitissessum í fíggjarheiminum og sum íðin listasavnari við høgum góðskukrøvum. Søgurnar eru nógvar og spennandi. Sum t.d. søgan um tá Sofus var noyddur undir jørðina undir krígnum, ella um tá hann rópti varskó um fíggjarpolitikkin hjá Føroya Banka í 80'árunum, ella søgan um vinmannin og bygdamannin Frimod Joensen, ið var noyddur til skips, hóast hvørki evnir ella heilsa vóru til hetta, ístaðin fyri at hann slapp at menna sínar ríku myndlistagávir.

Upptøkurnar til filmin eru gjørdar í heiminum við Tinghúsvegin, men seinasti upptøkudagurin var gjørdur á Sandi, m.a. á Listasavninum, men eisini í bygdini, har Sofus sleit sínar barnaskógvar.

Enn er ikki greitt nær filmurin verður liðugur, og sum er, er bert ætlan um at sýna hann á savninum.

## Klaksvík fær Snarskivu

Í lýsing í bløðunum søkir Klaksvíkarkommuna eftir leiðara til Snarskivuna, ið Klaksvíkar býráð hevur gjørt av at seta á stovn nú.

Í lýsingini sigur Klaksvíkar kommuna, at Snarskivan er partur av menningarætlanini fyri kommununa.Hon er ein roynd at røkka longur og betur út til borgararnar í kommununi sum eitt væl- og skjóttvirkandi lið millum býarumsiting/ býráð og borgara.

Við hesum stigi traðkar Klaksvíkar kommuna í fótafetini hjá Tórshavnar kommunu, sum í 2000 setti á stovn Snarskivu, ið samlaði alt sambandið við borgaran á einum staðið. Hugsjónin er, at borgarin skal hava eitt stað at venda sær til í øllum málum. Snarskivan í Tórshavn hevur verið sera væl umtókt millum fólkið í høvuðsstaðnum, og verður sædd ein greið betran av borgaratænastuni í býnum.

Snarskivan í Klaksvík letur væntandi upp síðst í hesum árinum.

**´nud**

# Stjørnurnar brustu saman í Nólsoy

**Gittarar, ljómborð, bassar og trummir vóru skift út við gaggir, bólt og málsmanshandskar, tá tónleikarar undir tretivu smurdu tónleikarar yvir tretivu av í einum fótbóltsdysti, ið fer í føroyska tónleikasøgu sum ein klassikari.**

OVASTEVNA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í sambandi við Prix Føroyar varð sera nógv tosað um, hvørt tað er rætt at kappast í tónleiki. Her var eisini havt á loftið, at onkur av teimum eldru forðaðu fyri, at tey ungu sluppu fram-at. Á ovastevnuni leygardagin, vóru ljóðførini løgd til síðis, og teir gomlu møttu teimum yngru í einum braki av einum fótbóltsdysti. 12-6 gjørdist endaliga støðan, tá unga fótbóltselitan innan tónleik basti gomlu gubbunum í tí fyrstu tónleikarar undir tretivu móti tónleikarum yvir tretivu kappingini.

Hóast tónleikarar yvir tretivu høvdu so miklar menn, sum Terja Rasmussen, Hans Petur í Brekkunum og Anfinn Nielsen á liðnum, so megnaði liðið lítið ímóti monnum sum Mikael Blak, Rúna Højgaard, Kristian í Vági og blendandi góða Róki Jákupsson Jakobsen, ið við einum hattrikki í hvørjum hálvleiki, gjørdist toppskjútti í málrika dystinum.

Vit fingu orð á Rók eftir dystin. Hann var sera vælnøgdur við bæði sítt egna spæl og við liðið. Hann metti fremstu orsøk til sigurin vera skjótleikin hjá unga liðnum.

Hann sá tað eisini sum ein greiðan fyrimun hjá yngru leikarunum, at fyrireikararnir høvdu gloymt at skipa fyri farti av Rituni niðan til vøllin.

- Fleiri av gomlu leikarunum vóru so pøstir av gongutúrinum, at teir næstan ikki orkaðu at spæla áðrenn dysturin var komin í gongd, greiddi Rókur frá og vónaði at fyriskipararnir skipa fyri farti næstu ferð, soleiðis, at teir eldru eisini hava ein møguleika.

Rókur sigur, at ætlanir eru um, at tílíkar kappingar skulu haldast javnan, men ivast í, at veruligur spenningur kemur í fyrstu árini.

- Eg meti at við stórsigrinum í dag, so hava vit prógva, at tað verður ikki fyribils, at tónleikarar yvir tretivu klára at basa okkum yngru. Men eg meti tó, liðið yvir tretivu at vera størfavorittar at vinna um trý ár, sigur 27 ára gamli Rókur.

Eitt sindur av spenningi var um at koma í dystin, tá eitt heldur ivasamt brotsspark varð dømt móti Róki. fyri hond á bóltin. Støðan hendi, tá Rúni Højgaard í yngra málinum hevði eina av nógvum góðum bjargingum, og bólturin stakk upp í albogan hjá Róki.

- Eg meti ikki at ein dómari sum Kim Milton hevði dømt brotsspark í hasi støðuni, segði Rókur.

Brotssparkið varð tó dømt og Terji Rasmussen settur at taka. Terji hevði eitt frálíkt skot heilt úti við stongina, men Rúni bjargaði sera sannførandi, og eftir hetta var eingin veruligur ivi um sigurin. Rúni spældi somikið væl allan dystin, at fyrrverandi HB og AB málverjin, sambært okkara heimildarfólki, átti at verið eitt gott boð uppá ein nýggjan landsliðsmálverja.

Bestu detaljuna átti Mikael Blak, tá hann við einum saksasparki økti um munin. Hetta mál var sambært heimildarfólki okkara í Nólsoy somikið flott, at Zuma hevði verið øvundsjúkur.



*Lið undir 30: Ovara rað f.v.: Kristian í Vági, Hergeir Staksberg, Sveinur Gaard Olsen, Heri Reynheim, Uni Debess (venjari). Niðara rað f.v.: Rókur Jákupsson Jakobsen, Rúni Højgaard(málmaður), Rói Christiansen og Mikael Blak*



*Lið yvir 30: Ovara rað f.v.: Ingi Isaksen, Terji Rasmussen, Karl Martin Samuelsen, Jan McIntosh. Niðara rað f.v.: Anfinn Nielsen (málmaður), Hans Petur í Brekkunum, Arnold Ludvíg og Brandur Jacobsen*